

Lýst verður eftir granskara til verkætlanarstarv

Havstovan lýsir eftir granskara til tíðaravmarkað starv at gera eina vísindaliga meting av havfrøðiligum mátingum á Grønland-Skotland Rygginum. Vit leita eftir granskara við áhuga fyri havfrøði og veðurlagsbroytingum, og sum hevur hegni at arbeiða sjálvstøðugt við dátugreining og at skriva frágreiðingar.

Rákið tvørtur um Grønland-Skotland Ryggin hevur alstóran týdning fyri stórskala rák í Norðuratlantshavi og fyri fluting av varma og vatnmassum millum Norðuratlantshav og Norðurhøv.

Havstovan hevur síðani 1990ini gjørt hydrografiskar mátingar í føroyskum sjógvi og mátað rákið tvørtur um Ryggin. Í eini nýggjari verkætlan, nevnd SAGA (Sub-Arctic Gateway Array), samstarvar Havstovan við granskarar í Íslandi, Skotlandi og Noreg um at styrkja og eftirmeta mátingarnar á øllum Rygginum. Eftirmetingin fevnir m.a. um at kanna, í hvønn mun verandi mátingar kunnu nýtast sum møguligir ávísar fyri veðurlagsbroytingum. Í hesum sambandi skulu verandi tíðarrøðir dagførast. Arbeiðið verður gjørt í tættum samstarvi við starvsfelagar í verkætlanini.

Arbeiðsøkið

- Góðskumeting av havfrøðiligum dátum og dagføring av verandi tíðarrøðum.
- Greining av tíðarrøðum, og meting av teirra eginleikum sum ávísar fyri veðurlagsbroytingum. Úrslitini verða skrivað í frágreiðing, við møguleika fyri vísindaligari grein.
- Luttøka á verkætlanarfundum, ráðstevnum og øðrum fundum.
- Granska sjálvstøðugt, men við vísindaligari vegleiðing og stuðli frá granskarum, sum eru knýttir at verkætlanini.

Førleikakrøv

Vit leita eftir eldhugaðum og samstarvsfúsum persóni við góðum kunnleika innan fysikk ella matematikk.
Umsøkjarin skal hava:

- PhD í havfrøði, veðurlagsfrøði ella tilsvarandi førleikar innan líknandi fakøki
- Góðar rokniførleikar og royndir við framkomnari dataanalysu og hagfrøði
- Førleikar í forritan, t.d. í MATLAB, Python ella líknandi programmum til vísindaliga dataanalysu og visualisering
- Góðan kunnleika í enskum, bæði í skrift og talu
- Góð evni at samstarva og arbeiða í einum altjóða, tvørfakligum toymi

Setanartreytir

Starvsbyrjan er **1. januar 2027**, ella skjótast til ber. Verkætlanin og starvssetanin eru tíðaravmarkað og enda 31. desembur 2027.

Starvsstaðurin er á Havstovuni.

Løn sambært sáttmála millum Akademikarafelagið og Fíggjarmálaráðið.

HAVSTOVAN
FAROE MARINE RESEARCH INSTITUTE

Nóatún 1
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel +298 35 39 00
hav@hav.fo
www.hav.fo

Umsókn
Umsókn við avritum at prógvum, CV og viðkomandi skjølum skal vera Havstovuni í hendi í seinasta lagi **15. desember 2026 kl. 10**.

Umsókn skal sendast í telduposti til Havstovuna frámerkt "SAGA starv" á **starv@hav.fo**.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Karin Margrethu H. Larsen, deildarleiðara, teldupost **karinl@hav.fo**, tlf. 353900.

Um SAGA: SAGA (Sub-Arctic Gateway Array) er ein altjóða verkætlan, sum er fíggjað av Norðurlendska Klima og Luft Programminum hjá Norðurlandaráðnum. Havstovan samskipar verkætlanina við luttøku av Haf og vatn (Ísland), Marine Directorate (Skotland) og NORCE (Noreg). Verkætlanin sameinir granskarar við áhuga í økinum og styrkir samstarvið og havfrøðiligu mátingarnar á Rygginum.

Um Havstovuna: Havstovan granskar føroyska havumhvørvið og tað, sum í tí livir. Umframt at kanna fiskastovnar og vistskipanir í havinum, ger Havstovan eisini havfrøðiligar mátingar av fysiskum og kemiskum viðurskiftum í havinum, herundir mátingar av hita og saltinnihaldi, streymmátingar og annað í hesum sambandi.

HAVSTOVAN
FAROE MARINE RESEARCH INSTITUTE

Nóatún 1
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel +298 35 39 00
hav@hav.fo
www.hav.fo